**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1206**
**Tíðarskeið 7-20/03 2012**

**Fólk frá HAV.:** Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Rógvi Mouritsen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av vár-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Haraftrat skulu magar takast regluliga av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til aldursgreining av havtasku, sild, svartkjafti og makreli skal fáast til vega.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinshamn lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar eru lagdar kring allan Landgrunnin grynri enn 500 m, sí mynd 1. Hetta eru støðir, ið eru tiknar á hesum báðum túrunum í vár, t.e. bæði á seinasta túri (1204) og á hesum túrinum (1206).






**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á vári við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki (myndin til vinstru). Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 100 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Vegna vánaligt veður varð ikki farið av stað fyrr enn leygarmorgunin 10. mars. Av teimum íalt 100 trolstøðunum, ið verða tiknar á yvirlitstrolingunum á vári, vórðu 63 støðir

tiknar fyrra túrin; sostatt vóru 37 støðir eftir at taka á hesum túrinum. Byrjað varð at fiska leygardagin um 13-tíðina á eini støð í Sandshavinum, og so varð hildið á longur vestur og síðani suðuryvir vestanfyri. Veðrið var sera vánaligt, serliga fyrstu dagarnar, og onkur bakkdagur var umframt dagar, har bert eydnaðist at taka heilt fáar støðir. Men veðrið batnaði, sum túrurin leið, og tað eydnaðist at hava fingið allar tær ætlaðu støðirnar sunnudagin 18. mars. Mánadagin fyrrapart tóku vit 2 serligar makrelstøðir eystan- og vestan fyri Sandoynna, og so varð siglt á Havnina, og túrurin var sostatt liðugur. Sum áður nevnt var veðrið sjaskut og ringt á so at siga øllum túrinum, men sum heild eydnaðist túrurin væl, hóast fýra støðir máttu takast umaftur, tí vit komu fastir/skræddu.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært sýnishandbókini og kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum av ávikavist toski, hýsu, upsa, svartkjafti og havtasku sæst í talvu 1 niðanfyri. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar av toski, hýsu og upsa tiknir og kannaðir umborð. Umframt hetta vórðu sildir frystar til nærri kanningar í landi.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 1206.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 377 | 83 | 340 | 94 | 391 | 63 | 49 | 11 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 1168 |
| Tal á magum tilsamans: | 240 |

**Nær verða prøvarnir upparbeiddir:** Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar, og øll data løgd inn í databasu sum skjótast, helst áðrenn 12. apríl.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrunum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á vári í ár, men nøkur ávegis úrslit skulu takast fram. Talva 2 vísir yvirlit yvir veiðuna av teimum ymsu sløgunum á hesum túrinum; 36 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt agnhøgguslokk, mathøgguslokk, hummara, rækju og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Í somu talvu sæst eisini, á hvussu nógvum støðum tey einstøku fiskasløgini eru fingin, t.e. hvussu vanlig tey eru. Mest varð fingið av hýsu, og síðani koma ávikavist toskur, upsi, lítli kongafiskur, svartkjaftur og longa. Lítli kongafiskur varð fingin á 95% av støðunum, toskur á 84%, hýsa á 81%, longa á 70% og upsi og hvítingsbróðir á 68%.

Um allar støðirnar í vár verða lagdar saman (báðir túrar), fæst ein heldur øðrvísi mynd (Talva 3). Á teimum 100 støðunum vórðu veidd 43 ymisk fiskasløg í mun til 44 sløg í fjør; umframt vórðu hummari, rækja, 2 sløg av høgguslokki og skrambul(sí omanfyri) fingin. Mest var av toski, og síðan koma ávikavist hýsa, upsi, hvítingsbróðir, lítli kongafiskur, gulllaksur og longa. Í fjør varð heilt væl fingið av fiskaslagnum "lýrur"; tað nógva av honum var væl áleiðis at gýta. Í ár vórðu bert fingin eini 61 kg av lýri á 4 støðum. Í fjør varð nakað fingið av ársgomlum makreli, ið stavar frá gýtingini árið fyri; eingin makrelur varð fingin í ár. Um títtleikan er at siga, at hýsa varð fingin á 83% av støðunum, toskur á 81%, lítli kongafiskur á 79%, longa á 72% og upsi á 70%.

Størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa; men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til. Á myndunum 2-8 sæst veiða upp á roynd

frá yvirlitstrolingunum á vári (allar 100 støðir) fyri nøkur úrvald fiskasløg. Veiða upp á roynd verður vanliga nýtt sum eitt mát fyri, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt. Tølini fyri t.d. upsa skulu tó takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættuliga óneyvar fyri upsa; hetta skyldast m.a., at upsi ofta gongur í torvum. Verður rakt við eina torvu, so fæst nógv, annars fæst lítið, og úrslitið sigur tí ikki so nógv um, hvussu nógv er til í øllum økinum. Nakað tað sama ger seg galdandi fyri tosk í gýtingartíðini, sum er í mars. Tá savnast hann ofta og stendur tættur í smáum økjum. Verður tóvað á tílíkum økjum, fæst nógv, uttan at tað neyðturviliga merkir, at stovnurin er stórur.

Eftir hesum úrslitum vaks hvítingsbróðir nógv í 4 ár herfyri, men er hann minkaður munandi aftur seinastu 2 árini, hóast hann enn er væl fyri. Lítið hevur verið at fingið av svartkjafti í fleiri ár, men í fjør og í ár hómast ein lítil bati, serliga tí at væl meira hevur verið at fingið av smáttfallandi fiski, sum týðir uppá, at tilgongdin er batnandi (Mynd 2).




**Mynd 2.**

Longa og brosma tykjast væl fyri, meðan stóri konga-fiskur er í minking (Mynd 3). Av flatfiski tykjast reyðsprøka og tunga at vera væl fyri, meðan sera lítið hevur verið at fingið av kalva seinastu tvey árini (Mynd 4).




**Mynd 3.**




**Mynd 4.**

Við tí stóru roynd, ið er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórir stovnarnir eru. Av tí sama er stórur partur av stovnunum ungur fiskur. Og bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi. Vektin á einstøku fiskunum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru bæði toskur, hýsa og upsi hampiliga væl fyri.




**Mynd 5**. Veiða upp á roynd fyri tosk frá yvirlitstrolingunum á vári.

Á mynd 5 sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsa vaks skjótt (Mynd 3), og var tað her 1993- og 1994-árgangirnir, ið skaraðu framúr. Góð tilgongd fekk síðan allar tríggjar stovnar at vaksa, men frá 2002 minkaði toskastovnurin nógv til søguliga lág virði. Síðan 2007 vaks stovnurin aftur vegna hampuliga góða tilgongd, serliga av 2008-árgangunum, men í ár varð sera lítið fingið. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at m.a. støddin á nýggjum árgangum kann verða mett. Men umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so at toskastovnurum veruliga kann koma fyri seg aftur.




**Mynd 6**. Veiða upp á roynd fyri hýsu frá yvirlitstrolingunum á vári.

Fyri hýsu er veiðan upp á roynd støðugt minkað síðan 2002, og var úrslitið í 2010 á leið tað í 1994 (Mynd 6); størsta orsøkin til hesa minking stavar helst frá vánaligari tilgongd í nógv ár. Í fjør hómaðist ein lítil bati, ið serliga stavar frá 2-ára gamlari hýsu (2009-árgangurin. Úrslitið í ár var nakað tað sama sum í fjør. Men glottar eru at hóma, tí fyri fyrstu ferð í fleiri ár varð nakað fingið av árs-gamlari hýsu.

Havandi í huga ta stóru óvissu við slíkum kanningum av upsa, so er ein varislig niðurstøða helst, at upsastovnurin er nakað minni enn miðal fyri tíðarskeiðið 2002-2009, men enn er hann ikki illa fyri (Mynd 7).




**Mynd 7**. Veiða upp á roynd fyri upsa frá yvirlitstrolingunum á vári.

.

*21. mars 2012* *<u>Jákup Reinert</u>*

| Talva 2. | Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á túri 1206<br>37 støðir íalt | |
|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Hýsa | 3475.191 | 81 |
| Toskur | 1825.540 | 84 |
| Upsi | 1465.018 | 68 |
| Lítli kongafiskur | 846.070 | 95 |
| Svartkjaftur | 353.392 | 14 |
| Longa | 342.983 | 70 |
| Stóri kongafiskur | 236.984 | 35 |
| Hvítingur | 222.095 | 32 |
| Reyðsprøka | 211.823 | 41 |
| Gullllaksur | 188.740 | 41 |
| Hvítingsbróðir | 143.514 | 68 |
| Tunga | 94.171 | 65 |
| Skrambul | 65.961 | 73 |
| Brosma | 58.518 | 32 |
| Havmús | 56.009 | 11 |
| Trantkongafiskur | 55.409 | 19 |
| Havtaska | 53.869 | 11 |
| Knurrhani | 52.859 | 51 |
| Sandsprøka | 49.222 | 30 |
| Mathøgguslokkur | 43.982 | 62 |
| Lítla brosma | 25.383 | 5 |
| Glaskvoysa | 23.371 | 32 |
| Hvassasprek | 19.131 | 22 |
| Lýrur | 11.115 | 5 |
| Blálonga | 9.570 | 8 |
| Búksvarti hávur | 9.302 | 5 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 8.654 | 30 |
| Lálla | 7.724 | 8 |
| Lýsingur | 7.500 | 5 |
| Rognkelsi | 6.905 | 3 |
| Skøta | 6.430 | 3 |
| Hummari | 3.700 | 8 |
| Klingruskøta | 2.964 | 3 |
| Agnhøgguslokkur | 2.546 | 14 |
| Rossamakrelur | 2.236 | 5 |
| Sild | 2.081 | 14 |
| Tindaskøta | 0.643 | 3 |
| Steinbítur | 0.571 | 3 |
| Silvurmurtur | 0.473 | 3 |
| Glýsufiskur | 0.156 | 3 |
| Rækja | 0.017 | 3 |

**Talva 3. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á vári 2012**
**Báðir túrar tilsamans - 100 støðir íalt**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|
| Toskur | 8772.528 | 81 |
| Hýsa | 7415.543 | 83 |
| Upsi | 7080.078 | 70 |
| Hvítingsbróðir | 3324.209 | 65 |
| Lítli kongafiskur | 2542.270 | 79 |
| Gulllaksur | 2538.081 | 38 |
| Longa | 1668.553 | 72 |
| Svartkjaftur | 966.720 | 27 |
| Hvítingur | 807.993 | 27 |
| Silvurmurtur | 536.701 | 7 |
| Reyðsprøka | 496.908 | 38 |
| Stóri kongafiskur | 464.172 | 32 |
| Brosma | 376.431 | 37 |
| Tunga | 279.371 | 64 |
| Knurrhani | 261.773 | 43 |
| Blálonga | 241.102 | 11 |
| Skrambul | 216.816 | 83 |
| Sandsprøka | 114.384 | 36 |
| Havtaska | 114.349 | 12 |
| Trantkongafiskur | 101.472 | 13 |
| Havmús | 80.422 | 7 |
| Mathøgguslokkur | 76.870 | 55 |
| Lýrur | 60.850 | 4 |
| Tindaskøta | 54.747 | 6 |
| Hvassasprek | 49.517 | 22 |
| Lítla brosma | 30.180 | 3 |
| Skøta | 28.000 | 3 |
| Glaskvoysa | 25.106 | 14 |
| Lálla | 17.066 | 7 |
| Kjaftsvarti hávur | 15.277 | 15 |
| Rognkelsi | 14.060 | 3 |
| Sild | 13.876 | 14 |
| Liri | 13.865 | 2 |
| Glýsufiskur | 9.637 | 4 |
| Búksvarti hávur | 9.302 | 2 |
| Agnhøgguslokkur | 8.652 | 14 |
| Lýsingur | 7.500 | 2 |
| Klingruskøta | 7.309 | 4 |
| Hvítaskøta | 5.715 | 1 |
| Silvurkalvi | 3.920 | 1 |
| Hummari | 3.700 | 3 |
| Steinbítur | 3.296 | 3 |
| Rossamakrelur | 2.921 | 3 |
| Kalvi | 1.615 | 1 |
| Svartkalvi | 1.115 | 1 |
| Nebbasild | 0.847 | 5 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 0.311 | 2 |
| Rækja | 0.017 | 4 |